# Káin og Ábel

## Ein søga um øvundsjúku millum systkin

Hesin teksturin hóskar væl at siga ella lesa fyri næmingunum. Lærarin eigur at hava lisið tekstin frammanundan, so hann kann liva seg inn í søguna. Gott er, um nýggj og torfør orð ella máliskur verða gjøgnumgingnar í flokkinum, áðrenn teksturin verður lisin upp ella endursagdur.

Teksturin er ætlaður at skapa eina djúpa hugsavnan og innliving í søguna. Hetta kann lærarin kanska gera við at sløkkja ljósið, tendra eitt kertuljós og møguliga biðja óstillar næmingar blunda og savna seg um at lurta.

Í námsætlanini fyri kristnikunnleika og átrúnað er krav, at eftir 2. flokk skulu næmingarnir *duga at lurta eftir frásøgnum og søgum*. Hetta skal venjast. Best er, um spurningar, prát og annað virksemi bíðar, til lærarin er liðugur at lesa ella siga frá.

Niðast á hesi síðuni eru uppskot til hugvekjandi samrøðu. Ikki er neyðugt at taka allar spurningarnar við í viðgerðina.

*Anne Schjelderup hevur endurgivið søguna úr Gamla Testamenti við egnum orðum og tulkingum.  Hetta er sostatt ikki beinleiðis frásøgn úr Bíbliuni.*

# Káin og Ábel

## Ádam og Eva fáa sonin Káin.

Neyðars Ádam og Eva. Tey vóru kedd og bangin. Gud hevði rent tey út úr tí vakra Eden, har alt hevði verið so gott og fjálgt. Nú  máttu tey velta og arbeiða og stríðast og strevast fyri at yvirliva.

Í fleiri mánaðar høvdu tey ikki havt tak yvir høvdið, og mangan fóru tey svong í song. Nú er at siga, at tey áttu onga song – tey høvdu bara savnað saman nakað av hoyggi, sum ofta var vátt og kalt at liggja á.

Sum tíðin leið lærdu tey at búleikast uttan fyri Eden. Tey gjørdu eitt telt úr geitaskinni og høvdu funnið sær eitt gott lendi at velta. Tey hugdu at øllum tí tey høvdu avrikað og vóru hóast alt nøgd við lívið.

Tá ein tíð var fráliðin fingu tey ein son, sum tey nevndu Káin. Gita, um tey vóru glað og ansaðu væl eftir lítla Káin? Ádam tók hann við sær út á akurin og vísti honum, hvussu hann skuldi seta niður, velta og fáa ymiskar plantur at geva avgrøði. Um kvøldarnar sat Eva við honum í fanginum og fortaldi honum søgur um tíðina í Eden. Hon var von at kýna honum um ennið, kyssa hann, nana og syngja fyri honum. Káin var elskaður av foreldrum sínum. Hann var fyrstføddur og fekk alt uppmerksemið hjá Ádami og Evu.

## Káin fær ein lítlabeiggja.

Nøkur ár seinni fekk Káin ein lítlabeiggja. Hann varð nevndur Ábel. Ábel var avbera lítil, og neyðugt var at ansa serliga væl eftir honum. Hann var so fittur og góður, altíð blíður og týður, og Ádam og Eva vóru so góð við hann. Tey hjúklaðu um hann og ansaðu eftir honum, Eva kysti hann, og Ádam kastaði hann upp í luftina og fekk hann at flenna. Alt, sum Ábel gjørdi, løgdu tey til merkis og hildu, at tað var ótrúliga væl gjørt.

Káin helt, at tey ikki longur løgdu í hann. Hann gjørdist øvundsjúkur. Hann ynskti, at Ádam og Eva eisini hugdu at honum, men sama hvat hann gjørdi, so sóu tey bara Ábel. Hetta gjørdi Káin illan og keddan og so við og við gjørdist Káin ein ótangi. Hann gjørdi fortreð, leyg og stjól.

Ádam og Eva skeldaðu Káin ferð aftan á ferð og skiltu ikki, hvat var hent við fitta dronginum hjá teimum. Tá fór Káin burtur frá teimum og græt í einsemi. Hann hugdi at Ábel, sum sat og hugnaði sær á fanginum hjá Evu, og hann visti, at hann hataði hann. Káin setti sær fyri, at hann skuldi gerast betri enn Ábel á øllum økjum. Hann helt, at tá fóru foreldrini endiliga at skilja, at hann var tann betri sonurin.

## Káin og Ábel gerast vaksnir.

Árini gingu, og Káin og Ábel gjørdust vaksnir menn. Káin hjálpti Ádami at velta og røkja jørðina, meðan Ábel røktaði neytini, seyðin og geitirnar. Ábel var altíð so fittur og blíður. Um nøkrum tørvaði okkurt og bað um hjálp, var hann altíð fúsur at hjálpa. Um onkur var keddur, gav hann sær stundir at lurta og troysta tey. Øll vóru góð við Ábel – enntá dýrini elskaðu hann. Tey komu rennandi ímóti honum, tá tey fingu eyga á hann.

Káin var framúr raskur og sterkur maður. Hann gjørdi alt, hann megnaði fyri pápan. Alt, sum hann nam við, fekk hann at grógva og geva avgrøði. Hann var góður til hendurnar eisini. Dugdi at gera amboð, smíða, umvæla og annað handaligt arbeiði. Hann hevði eisini gjørt ein góðan og sterkan garð til dýrini hjá Ábal.

Káin arbeiddi hart og leingi hvønn dag, hann royndi alt hann kundi at vera bestur, men einki nyttaði – Ábel var altíð eitt sindur frammanfyri. Ein dagin kom Káin stoltur og fegin inn við einum knívi, sum hann hevði gjørt til Evu. Eva rósti Káin, men stutt eftir kom Ábal inn við mjúkari ull, sum hann leikandi kitlaði Evu við. Hetta fekk Evu at flenna, og hon gav Ábal eitt klemm. Káin gjørdist uppaftur meira øvundsjúkur. Hví dámdi henni altíð tað, sum Ábal gjørdi, best?

Ein annan dagin kom Káin inn við rótum og gularótum til nátturðan. Sama dag kom Ábel við so moyrum seyðalundum, at tað var tað einasta tey tosaðu um, tað ið eftir var av degnum. “Sum tað smakkar væl,” segði Eva. Ádam undraðist og spurdi Ábal, hvussu hann hevði borið seg at, at fáa kjøtið so moyrt. Káin beit tenninar saman. Hann segði einki, men skeitti illur yvir á beiggja sín.

## Ofrið til Gud.

Ein dagin skuldi Káin og Ábel ofra til Gud. Teir bygdu hvør sítt altar, sum teir skuldu ofra á. Hesa ferð, hugsaði Káin, skal eg vinna á Ábel. Hóast mamma og babba ikki skilja, at eg eri betri enn hann, so fer Gud uttan iva at skilja tað. Hann savnaði saman alt tað besta, sum hann hevði velt, og legði tað í eina stóra rúgvu á altarið. Alt, sum hann legði har, var fullkomið, har var ikki ein riva í bløðunum, einki epli hevði ein blett, salathøvdini vóru grøn og so stór sum leyvuhøvd, kornið var hvítt og gott, og allar røturnar vóru stórar og leskiligar. Káin hugdi errin at litríka altarinum hjá sær. Eingin bóndi kundi havt lagt betri korn ella grønmeti fram fyri Gud. Hetta fór Gud at rósa honum fyri.

Ábel græt, tá hann kysti lambið hjá sær fyri seinastu ferð, áðrenn hann drap tað. Hann legði tað varisliga á altarið og streyk tí eftir tí mjúku ullini. So legði hann seg á knæ framman fyri altarið, og meðan tárini runnu niður eftir kinnum hansara, bønaði hann Gud um at taka av tí ofrinum, sum hann gav honum í kærleika. Káin bað eisini framman fyri altarinum hjá sær. Við læstum tonnum bað hann Gud taka ímóti ofrinum. Hann vónaði inniliga, at Gud fór at vísa øllum, at hann var tann sterkasti, raskasti og dugnaligasti av brøðrunum.

Gud hugdi við tokka at ofrinum hjá Ábel og tók ímóti tí. Ofrið hjá Káin tók hann ikki ímóti. Tá Káin sá hetta, varð hann karvandi óður. Hann kendi á sær, hvussu øðin vaks. Hann beit tenninar saman og stardi niður í bøin. Tá segði Gud við hann: “Hví ert tú vreiður, og hví starir tú niður fyri teg? Hvat feilar tær? Um tú gert tað rætta, kanst tú ganga við upplyftum høvdi, men um tú ikki gert tað rætta, liggur syndin og bíðar eftir tær. Hon vil hava valdið yvir tær, men tú noyðist at vinna á henni.

## Káin drepur Ábel.

Káin vendi sær móti Ábel og bað hann koma við sær út á akurin. Ábel grunaði einki ilt og fór við honum. Nakað seinni steðgaði Káin á og hugdi ilskur at beiggja sínum. Ábel hugdi spyrjandi at honum og skilti als ikki, hví Káin var so vreiður. Hetta óseka eygnabráið gjørdi bara Káin uppaftur illari. Hann tók í beiggja sín, og áðrenn hann visti av, hevði hann sligið hann so hart, at hann fall lívleysur til jarðar. Blóðið rann frá munninum og einki lív var í eygum hansara.

Spakuliga gjørdist tað greitt fyri Káin, at beiggi hansara lá lívleysur á akrinum. Vreiðin var nú horvin. Hann skalv av ræðslu. “Reis teg!” rópti hann við bivandi rødd. “Reis teg!” Men einki hendi. Lítlibeiggi hansara varð deyður!

Káin tók at renna. Hann rann sum fyri lívinum, men ikki bar til at renna frá tonkunum, sum nú mólu í høvdinum. Hann royndi at umbera gerðina fyri sær sjálvum: Hevði Ábel ikki oyðilagt hansara lív? Hevði hann ikki stolið kærleikan frá foreldrum teirra? Hevði hann ikki lifrað fyri Gudi við svikatárum fyri at vinna tokka hansara? Káin gavst at renna. Hann kikaði eftir ondini og royndi at fáa hjartað stilt aftur.

## Gud talar til Káin.

Tá talaði Gud til hansara og segði: “Hvar er Ábel?”. Káin gjørdist bangin og svaraði: “Tað veit eg ikki. Skal eg kanska ansa eftir beiggja mínum?” Tá segði Gud: “Hvat er tað, tú hevur gjørt? Blóðið, sum rann niður í akurin, rópar á meg. Tú skalt ei longur fáa ávøkstur av tínum stríði. Tá tú veltir, skal eingin avgrøði vera. Tú ert bannlýstur, heimleysur og friðleysur her á foldum.”

## Káin sær Guds umsorgan

Káin visti ikki, hvat hann nú skuldi gera. Hann kundi ikki verða verandi hjá foreldrunum eftir tað hann hevði gjørt. Sjálvt ikki Gud vildi ikki vita av honum longur. Hann varð bannlýstur. Hann tordi ikki at biðja Gud um umbering fyri tað, sum hann hevði gjørt, tí hann angraði og helt, at hann hevði uppiborið hesa lagnuna.

Hann sá fyri sær, hvussu Ábel lá og bløddi úti á akrinum. Hann mintist tað vakra andlitið, sum aldrin aftur fór at brosa til hansara. Hann mintist, hvussu lætt og skjótt hann plagdi at renna úti á bønum. Hann mintist tær mjúku hendurnar, sum ongantíð aftur skuldu kína Evu um ennið.

So fór hann at hugsa um foreldrini. Hann visti, at hetta fór at merkja tey restina av lívinum. Hann sá fyri sær, hvussu tey fóru at bera seg at, tá tey funnu líkið á akrinum. Hvussu tey fóru at rópa til Gud, gráta so sáran og skræða klæði síni.

So mintist hann, hvussu fittur Ábel hevði sæð út í tí bláa kotinum, sum pápin hevði gjørt til hansara tá hann var 5 ár. Hann mintist, tá teir vóru smáir, og hvussu stuttligt teir mangan høvdu havt tað, tá teir spældu saman. Hann mintist, at hann ofta hevði fingið Ábel at flenna

við at kitla hann. Hann sá smílið fyri sær. Smílið, sum hann aldrin skuldi síggja aftur. So hugsaði hann um ræðsluna, hann hevði sæð í eygunum hjá Ábel, tá hann hevði lopið á hann har úti á akrinum. Káin skilti, at hann hevði gjørt nakað, sum aldrin kundi bøtast aftur. Hann ynskti so innarliga, at beiggi hansara enn var á lívi, men nú var ov seint.

Hann fall á knæ og græt, men hann orkaði ikki at biðja Gud um fyrigeving, orkaði ikki at siga við Gud, at alt var hansara skuld, hóast hann væl visti, at so var. Hann bardist innan í sær sjálvum, men at enda hugdi hann upp ímóti himli og bønaði Gud um fyrigeving. Tá skilti hann, at Gud ikki var óndur. At hann sjálvur hevði skuldina av, at eingin hevði elska hann, tá hann var yngri. Hann kundi havt borið seg øðrvísi at. Hann kundi havt góðtikið, at Ábal var beiggi hansara. Hann kundi havt glett seg yvir, at hann átti ein so fittan lítlabeiggja, og givið familjuni kærleika uttan at vilja hava nakað afturfyri – eins og Ábel var vanur at gera.

Gud hoyrdi bønina hjá Káin og fyrigav honum.

# Spurningar til tekstin

1. Hvussu itu børnini hjá Ádam og Evu?

2. Hvør var eldri, Káin ella Ábel?

3. Hvat ofraði Káin og hvat ofraði Ábel til Gud?

4. Hví gjørdist Káin illur?

5. Hvussu doyði Ábel?

6. Hvussu varð Káin revsaður av Gudi?

7. Fyrigav Gud Káin?

## Svar til spurningarnar

1. Hvussu itu børnini hjá Ádam og Evu?

*Káin og Ábel*

---

2. Hvør var eldri, Káin ella Ábel?

*Káin*

---

3. Hvat ofraði Káin og hvat ofraði Ábel til Gud?

*Káin ofraði frukt, korn og grønmeti. Ábel ofraði eitt lamb.*

---

4. Hví gjørdist Káin illur?

*Tí Gud hevði tokka til offrið hjá Ábel og ikki hansara.*

---

5. Hvussu doyði Ábel?

*Káin drap hann*

---

6. Hvussu varð Káin revsaður av Gudi?

*Hann varð bannlýstur*

---

7. Fyrigav Gud Káin?

*Ja*

---

## Uppskot til hugvekjandi samrøður

1. Hevur tú nakrantíð verið øvundsjúk/ur? Hvussu kennist tað? Hvørjar hugsanir hevur tú, tá tú ert øvundsjúk/ur? Hvussu slapst tú av við hesa kensluna? Hvat hugsaðu hini um teg, tá ið tú vart øvundsjúk/ur?

2. Káin verður øvundsjúkur inn á Ábel, longu meðan Ábel er eitt pinkubarn. Kennir nakar til hesa støðuna? Hvussu er tað gjørligt at gerast øvundsjúkur inn á eitt lítið, hjálparleyst pinkubarn? Eitt pinkubarn kann ikki hótta ella skaða okkum á nakran hátt, ella kann tað?

4. Kann mann gerast øvundsjúkur inn á alt? Ella er okkurt ella onkur, sum ikki ber til at gerast øvundsjúkur inn á? Hví/hví ikki? Hygg at hesum dømunum og sig frá, um nakað er, sum ikki ber til at gerast øvundsjúk/ur inn á:

Ein appilsin

Ein súkkla

Ein omma

Mánin

Ein vinur

Ein hundur ella ketta

Ein roknilærari

Royn at ímynda tær støður, har tú ert øvundsjúk/ur inn hesar lutir ella menniskju. Hvussu kundi tú sloppið av við kensluna – øvundsjúkuna?

4. Káin royndi at gerast betri enn Ábel í øllum, so at foreldrini skuldu ásanna, at hann var hin betri sonurin. Hann ímyndaði sær, at so fóru tey at elska hann hægri, men meðan hann soleiðis stríddist og var upptikin av at gerast bestur, gjørdist hann beiskur av hatri.

Heldur tú, at Káin kundi borið seg øðrvísi at? Hvussu? Hví er Káin vorðin, sum hann er? Er tað hansara skuld? Eigur Ábel kanska skuldina, ella eru tað foreldrini, sum hava gjørt Káin øvundsjúkan?

5. Søgan sigur, at Gud hugdi við tokka at ofrinum hjá Ábel, og at hann ikki hevði tokka til ofrið hjá Káin. Hvussu kunnu vit vita, hvat Gud helt um ofrini? Hvussu hevur Gud víst seg

fyri teimum báðum beiggjunum? Sóu teir hann? Hoyrdu ella føldu teir hann? Hevur hann tosað gjøgnum skýggini, ella hevur hann tosað beinleiðis inn í hjørtuni hjá dreingjunum? Hvat heldur tú?

Heldur tú, at Gud var rættvísur? Átti hann kanska at haft tikið ímóti ofrinum hjá Káin?

6. Káin vildi biðja Gud um fyrigeving, men hann orkaði ikki. Innan í honum var okkurt, sum forðaði honum í at venda sær til Gud. Heldur tú, at tað er torført at biðja um umbering, tá ið tú hevur gjørt okkurt skeivt? Um ja, hví er hetta so torført?

Er tað kanska tí at:

- Vit kenna okkum tápulig?

- Vit eru bangin fyri at avdúka fyri Gudi og okkum sjálvum, hvussu ónd vit eru?

- Tað er eyðmýkjandi at biðja um fyrigeving.

- Vit eru bangin fyri at siga okkurt skeivt?

**Hvar í Gamla Testamenti?**

Søgan um Káin og Ábel er í 1. Mósebók, kapittul 4, versini 1 – 16.

**Um sjalusi og øvundsjúku.**

Á føroyskum hava vit trý orð um øvund: øvundsjúka, svartsjúka ella eljusjúka. Á útlendskum málum verður øvundsjúka nevnd sjalusi, sum kemur frá tí grikska orðinum "zelos", og merkir at vera sjúkur á húðini. Tað merkir, at tað tykist sum um mann er sjúkur, uttan veruliga at vera tað.

Sjalusi ella øvundsjúka eru kenslur, sum byggjast upp innan í okkum, tá ið okkara sjálvsmynd verður hótt av innari ella ytri vandum. Káin helt seg sjálvan vera hin einasta og besta sonin hjá Evu og Ádam. Ábel hótti við at oyðileggja hesa sjálvsmyndina, og tað gjørdi Káin so fúkandi øvundsjúkan. Heldur enn at broyta sína óveruligu sjálvsmynd, valdi Káin at broyta tað, sum hevði oyðilagt støðuna hjá honum, nevniliga, at Ábel var til staðar.